## Magni um politikk

- Eg fylgi hampiliga væl við í politikki – bæði altjóða og í Føroyum. Eg velji Tjóðveldisflokkin, men støðið á føroyskum politikki er ótrúliga lágt. Tað er pínligt at eygleiða føroyskan kjaksið í mun til onnur lond.



## Magni um føroyskan og italienskan mat

- Mær dámar heilt vist betur italienskan mat enn føroyskan. Vit eta av og á føroyskan mat, men vit eta í nógv størri mun eysturlendskan og suðurevropeiskan mat. Italienarar duga ótrúliga væl at gera mat

# Magni vil til stór



**Magni Mohr fer í summar til Danmarkar at skriva eina doktararitgerð, sum vónandi skal hjálpa honum enn longur fram á venjingarleið síni. – Málið er at gerast likamligur venjari hjá einum av heimsins størstu fótbóltsfeløgum**

Ítróttarprofilurin



**Heini S. Kristiansen**
heinik@sosialurin.fo

Magni Mohr er útbúgvin innan ”human fysiology”. Hann hevur seinastu árini arbeitt ymsastaðni og hevur fingið hollar royndir innan likamliga gransking og kanning av fótbóltsleikarum.

Magni hevur millum annað arbeitt fyri italienska stórfelagið Juventus. ”Tann gamla daman”, sum Juventus verður kallað í Italia, hevur í seinastuni verður í trupulleikum í samband við muturgøluna. Teir vórðu fluttir niður í Seriu B, men teir hava júst vunnið sær pláss í Seriu A næsta ár.

Tá ið Magni Mohr arbeiddi fyri Juventus, vóru teir kanska sterkasta felagið í Italia, og millum leikararnar taldust Del Piero, Zidane, Camonaresi, Zambrotta og Trezeguet.

Síðani hevur Magni eisini arbeitt fyri danska landsliðið og føroyska landsliðið, sum hann enn er knýttur at. Í fjør og fyrra árið var hann hjálparvenjari hjá B36.

### Vágbingur

Magni er uppvaksin í Vági. Hann tók HF í Vági og spældi fótbólt við besta liðnum hjá VB.

Magni fór niður at lesa, og hann var sera heppin at koma í samband við røttu fólkini beinan vegin.

- Eg slapp at arbeiða sum granskari beinan vegin. Eg kom í samband við Jens Bangsbo, sum var hjálparvenjari hjá Juventus, tá ið eg starvaðist har. Eg havi helst sett teir røttu spurningarnar til fyrilestrarnar, tí at hann spurdi meg, um eg hevði hug at arbeiða við teimum.

- Mítt lestrararbeiði var allatíðini at fáast við vísindarliga gransking. Tað er sera óvanligt, at ein sleppur so tíðliga at arbeiða í praksis, men eg var heppin, sigur Magni.

### Samantvinnar teori og praksis

Magni varð beinan vegin bergtikin av at arbeiða við vísindarligum kanningum, og hann hevur síðani verið við til at finna fram slóðbrótandi úrslit. Magni hevur eisini ein fyrimun við tað, at hann sjálvur hevur leikt fótbólt.

- Arbeiðið er at eygleiða venjingar og dystir og kanna ymsar støður og leikarar. Síðani royna vit at finna fram ymiskar loysnir, sum kunnu betra um venjingarnar og kunnu fáa leikararnar at íðka meira, sigur Magni.

- Tað er stórur munur á fótbólti og øðrum ítróttargreinum. Har havi eg ein fyrimun, tí at eg kenni fótbóltin í praksis. Nógvir granskarar kenna tað einans í teori. Avbjóðingin er at brúka úrslitini til nakað munagott á vøllinum. Tíðin í B36 gav mær eisini møguleika at royna hendan arbeiðsháttin, sigur hann.

### Virðisløntur granskari

Tá ið Magni gjørdist hjálparvenjari hjá B36, sóust beinan vegin broytingar í venjingunum hjá árstalsfelagnum í Havn. Teir fóru millum annað at hita upp aftur, áðrenn seinna hálvleikur byrjaði. Hetta hava onnur føroysk feløg nú tikið til sín.

- Vit hugdu at fleiri upptøkum og sóu, at leikarar íðka minni teir fyrstu minuttirnar eftir steðgin. Síðani gjørdu vit nakrar royndir við tveimum liðum, har ið annað liðið hitaði upp áðrenn seinna hálvleik, meðan hitt ikki hitaði upp. Tað vísti seg, at leikararnir, sum hitaðu upp í hálvleikinum, íðkaðu meira, sigur Magni.

Sosialurin